# Gerhard úr samgonguni

**Gerhard Lognberg boðaði í gjár frá av tingsins røðarapalli, at hann fer úr samgonguni, at hann nú arbeiðir frá máli til mál, men at hann verður í Javnaðarflokkinum**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað var av álvara spenningur í Løgtinginum hósdagin, tá Gerhard Lognberg fór á tingsins røðarapall stutt fyri klokkan 14.

Annars skemtiliga huglagið í tinginum fekk álvarsligari dám, so hvørt sum løtan nærkaðist, at Gerhard Lognberg skuldi boða frá, hvørt hann stuðlaði samgonguni.

Gerhard Lognberg hevði gjørt greitt, at eftir boðini um, at hann ikki fekk trygd fyri, at Sandoyartunnil varð gjørdur og byrjaður innan ávísa tíð, og at hol helst verður sett á Eysturoyartunnil fyrst, so fór hann av tingsins røðarapalli at boða frá, um hann framvegis var partur av samgonguni.

Og eftir at Gerhard Lognberg hevði í stuttum viðgjørt partar av løgmansrøðuni, kom spennandi løtan, og hann segði stutt og greitt, at hann fer úr samgonguni, men at hann nú tekur støðu til hvørt mál sær, og at hann verður verðandi limur í javnaðarflokkinum.

Sostatt kann ikki sigast, at samgongan hevur meirluta aftanfyri seg, men at talan hinvegin er um minnilutasamgongu.

Orðaskiftið løtuna eftir boðini fra Gerhadi bar brá av álvarsemið, og alt skemt og lætt huglag, sum annars hevði merkt viðgerðina av løgmansrøðuni, var burtur. Fólk harmðust, og floksfelgar Gerhards vóru ósamdir í grundgevingum hansara.

Og tað er ikki ov nógv sagt, at Gerhard av tingsins røðarapalli tók harðliga til



*Samgongan hevur meirluta aftanfyri seg. Myndin er tikin beint eftir, at Gerhard í gjár kom av tingsins røðarapalli*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Samgonguleiðarin altíð telvað meg til síðis

**Eg havi gjørt tað, ið eg mátti gera og gjørt eftir míni sannføring, sigur Gerhard Lognberg, eftir at hann hevur tikið seg aftur sum samgongulim. Hann sigur seg ikki vita, hvussu støðan er viðvikjandi sambandinum til flokk og floksfelagar. Og hann ger eisini greitt, at hann ikki tekur undir við ætlaðu broytingunum innan fiskivinnupolitikkin**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

- Eg fari at arbeiða so, at eg taki hvørt mál, sum tað kemur og taki støðu til hvørt mál sær. Ja, eg haldi í hvussu er, at eg fari at arbeiða so, tí enn havi eg sat at siga ikki rættiliga yvirskoðað støðuna rættiliga, segði Gerhard Lognberg seint seinnapartin í gjár, alt meðan viðgerðin av løgmansrøðuni helt fram, og Gerhard klokkan 14 sama dag hevði sagt frá, at hann ikki er limur í samgonguni.

- Eg fari at taka undir við tí, sum eg kann, og ikki taka undir, har eg ikki kann, og tað vil til dømis siga, at eg ikki kann taka undir við ætlanunum viðvíkjandi fiskidøgum, so sum tað er lagt fram, sigur Gerhard Lognberg.

### Tað súra við tí søta

Um samband sítt við flokk og floksfelagar í javnaðarflokkinum sigur Gerhard, at hann enn ikki veit rættiliga, hvussu har er statt, men at hann óivað hevur tað gott við summi, og minni gott við onnur, ið hava tikið sær støðutakan hansara nær.

- Men ein má taka tað súra við tí søta, sigur Gerhard Lognberg.

- Samgongan hevur svikið Suðurøkið sum heild og tikið optimismuna úr økinum, metir Gerhard, nú byrjanin uppá Sandoyartunnilin ikki er dagfest.

Og at Gerhad Lognberg kennir seg sviknan er onki at taka seg aftur í.

- Eg siteraði í tinginum frá einum fundi, har Høgni Hoydal og Jenis av Rana játtaðu at arbeiða fyri Sandoyartunnlinum, men ikki vildu hava tað fest í samgonguskjalið, men so fer Høgni Hoydal nú á røðarapallinum púra óávirkaður og sigur, at fundurin hevur ikki verið, sigur Gerhard Lognberg, ið eisini hevur mong onnur mál, ið hann ikki kann liva við, og t.d. vísur hann á ymisk pensjónsviðurskifti, ið samgongan hevur til viðgerðar.

### Lættur um sinnið

Spurdur, um tað er ein lætti, nú hann hevur fingið gjørt støðu sína greiða, sigur Gerhard Lognberg, at tað er tað fyri so vítt.

– Eg havi ein samgonguleiðara, sum skuldi verið mær nokkso nær, men sum eg ongantíð havi kent meg at hava nakað felags við, men hann hevur hinvegin altíð telvað meg til síðis, sigur Gerhard Lognberg.

– Eg havi gjørt eftir míni sannføring, og eg fari ongan veg, men haldi fram við tingarbeiðinum, og røki kanska betri mínum málum nú, enn nakrantíð áður, sigur sandoyartingmaðurin, sum í gjár setti spenning í tingarbeiðið og samgongustevið, fyri síðani at taka stuðul sín til samgonguna aftur.



*Gerhard Lognberg á røðarpallinum í løgtinginum í gjár*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Styrktur í trúnni

**Tá Gerhard Lognberg hóskvøldið kom til Skopunar, var skipað fyri stórari móttøku, og Gerhard fekk tárini fram, so rørdur gjørdist hann**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Stór móttøka var fyri Gerhardi Lognberg, tá hann hóskvøldið kom til Skopunar.

Eg má siga, at eg var positivt skjokkeraður. Har vóru fólk í øllum aldri, úr allari oynni og børn við fløggum, sigur Gerhard Lognberg.

- Eg fekk tár í eyguni, sigur Gerhard Lognberg.

- Eg eri styrktur í trúnni á, at tað eg gjørdi var rætt. Hetta var bæði styrki í trunni og styrki í móttganginum, sum mær hevur verið fyri, segði Gerhard Lognberg, tá vit hitt hann í tinginum í morgun.

- Neistin, ið berjist fyri tunnlinum, er ongantíð sterkari enn nú, leggur Gerhard Lognberg dent á.

Hinvegin veit hann onki um lagnu sína í Javnaðarflokkinum, men hann tókst ganga heldur eina í tinginum.

- Eg havi fingið fundarboð frá flokkinum klokan 18 í kvøld, segði Gerhard Lognberg fyrrapartin, og hetta samsvarar við, at leiðsla og starvsnevnd floksins hevur fundarvirksemi á skranni í dag.